Sigurð í Jákupsstovu oljustjóri:

Óvissan burtur

OLJUFYRISITINGIN
Jan Müller

Sigurð í Stórustovu, sum er settur sum stjóri á »nýggju« Oljufyrisitingini, er fegin um hepnu gongdina í málinum, eftir at Olju-málaráðið varð niðurlagt. Nú er so ein avgerð tikin og sleppa starvsfólkini tí undan at liva í óvissuni, og tað hevur alt at siga. Nýggi oljustjórin vil ikki gera viðmerking til avgerðina at niðurleggja Oljumálaráðið, tí tað var jú ein politisk avgerð, men soleiðis sum úrslitið er vorðið, heldur hann ikki, at myndugleikarnir hava niðurprioriterað oljuøkið.

– Nú óvissan er burtur ber til at fara til verka. Hetta verður ein sera stór avbjóðing, sum eg ætli mær at átaka mær í fullum álvara og í tøttum samstarvi við starvsfólkini sigur Sigurð í Jákupsstovu. Hann heldur, at man nú má taka sær ta neyðugu tíðina til at meta um fyrimunir og vansar við at leggja báðar stovnarnar saman.

Spurningurin er so, hvat fer at verða broytt í arbeiðinum, nú tað gamla Oljumálaráðið er farið í søguna. Tað eru so tey, sum siga, at Oljumálaráðið í síni tíð var partur av eini politiskari kabalu, og sigur man, at niðurleggingin av tí eisini er politikkur, so er status quo og man situr eftir við tí stovninum, sum skal gera arbeiðið, og sum nú fær sama heitið sum tað hann bar undan stovnanina av Oljumálaráðnum, nevniliga Oljufyrisitingin. Munurin ella broytingin verður so tann, at fyrrverandi stjórin er farin í annað starv, meðan uppruna-ligu uppgávurnar verða stórt sæð tær somu. Hugsast kann eisini, at henda endaliga loysn kann betra um samskiftið og møguliga eisini forstáilsið millum føroysku oljumyndugleikarnar og brúkararnar, sum m.a. eru oljufeløgini. Nú vita tey so við vissu, hvør adressan er, og hvør hevur ábyrgdina, politiskt og fyrisitingarliga.

Oljufyrisitingin fær aftur gamla heitið

NAVNABROYTING
Jan Müller

»Oljufyrisitingin«. Hetta verður heitið á tí stovni, sum í framtíðini skal umsita oljumál. Eftir áheitan frá landsstýrismanninum í vinnumálum hava starvsfólkini á tí niðurlagda Oljumálaráðnum gjørt av at finna tað gamla navnaheitið framaftur, nevniliga Oljufyrisitingin. Hetta er eisini í samsvar við ta fullmakt, sum Bjarni Djurholm hevur givið fólkunum, sum skulu umsita oljutilgongdina framyvir. Landsstýrismaðurin hevur nevniliga lagt upp til, at talan skal ikki vera um eina deild undir Vinnumálaráðnum, men heldur um ein sjálvstøðugan stovn við egnum stjóra, ja við egnum lívi. Stovnurin verður tí at sammeta við t.d. Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Landsverkfrøðingsstovnin.

Bjarni Djurholm er landsstýrismaður í oljumálum

– Eg havi latið lyklarnar frá mær aftur til stovnin, tí hann skal kunna arbeiða óheftur av landsstýrismanninum, men hann kemur so kortini at referera, vísa til landsstýrismannin í vinnumálum sigur Bjarni Djurholm, sum vónar, at starvsfólkini á stovninum við hesum kunnu fara ekkaleys og nøgd til arbeiðis undir tí nýggja karminum. Hann vónar at fáa eitt gott samstarv við stovnin og vil gera sítt til at fáa eitt smidligt og gott samskifti. Hann sær fyri sær nógvar spennandi og týðandi uppgávur í næstu framtíð. Fyribils verður so talan um tveir stovnar á olju- og undirgrundarøkinum, Jarðfrøðissavnið og Oljufyrisitingina. Leiðari fyri báðar stovnarnar er Sigurð í Jákupsstovu. Lagt verður nú upp til at kanna møguleikan fyri at leggja hesar báðar stovnar saman í ein felags stovn.

Búmerki til nýggjan festival skal finnast

Ein nýggjur Jazzfestivalur fer at ríka havnagøtur við tónleiki í summar. Heitið verður Havnar Jazz Festival, og tað er Havnar Jazz Felag, ið skipar fyri

Tónleikur
Tíðindaskriv

Eftir at gamli Jazz, Fólka og Blues Festivalurin fór í søguna er nú ein nýggjur festivalur á gáttini. Tað er Havnar Jazz Felag, sum síðani 1975 hevur skipað fyri konsertum í Havnini, ið tekur stig til nýggja festivalin.

Jazz, Fólka og Blues Festivalurin hevur verið hildin á hvørjum ári síðan 1984 undir leiðslu av Brandi Øssursyni, men við tað at Brandur flutti aftur til Danmarkar, eftir at hann fór frá við eftirløn á heysti 2003, er harvið hendan hátíðarstevnan hildin uppat.

Havnar Jazzfelag hevur síðani miðvíst arbeitt fyri at stovna ein nýggjan festival, sum skal fylla tað tómrúm, ið gamli festivalurin lat eftir sær. Vegna Havnar Jazz Felag eru Arnold Ludvig og kona hansara Anna Iachino sett sum høvuðssamskiparar av festivalinum.

Hetta er gjørt í samstarvi við Brandur Øssurson, ið hevur givið sína hjálp og sín stuðul til tiltakið.

Uni Debess er ein av teimum, sum skal spæla á nýggja jazzfestivalinum í summar. Mynd: Jens Kristian Vang

Øðrvísi karmar

Nýggi festivalurin fær heitið Havnar Jazz Festival, og verður samstundis eitt sindur øðrvísi enn tann gamli.

Konsertirnar vera ikki longur hildnar eina í Norðurlandahúsinum, men á Gamla Meiarínum, Sjónleikahúsinum, smærri spælistøðum í Havnini og eisini á Havnargøtum. Soleiðis fær festivalurin ein meira festival kendan dám.

Dentur verður á hesum fyrsta sinni lagdur á norðurlendskar og kanadiskar bólkar.

Nøvn á festivalinum

Festivalurin verður frá døgunum 28 juni til 4 juli, og nógv spennandi nøvn eru longu komin á skránna. Nevnast kunnu til dømis New Jungle Orchestra (DK), sum hevur verið eitt av allarbestu jazzorkestrum í Europa í nógv ár, og sum nú eru fløguaktuellir við Live from Birdland. Eisini verður verðinskenda diskostjørnan, Geraldine Hunt, ið millum annað hevur gjørt og sungið lagið, Can't fake the Feeling, við á festivalinum. Hon fer her at spæla saman við The Arnold Ludvig Trio.

The Merlin Factor við luttøku av Jim Hillman og Tuku frá Kanada. Jussi Kannaste Quartet frá Finnlandi.

Sjálvandi vera tað eisini nógv góð føroysk nøvn á skránni so sum Uni Debess Band, Hans Petur í Brekkunum Band, Yggdrasil og onnur.

Búmerkið

Til Festivalin skal nú finnast eitt nýtt búmerki. Tískil skipar Havnar Jazzfelag fyri búmerkjakapping. Freistin er longu sett til 15 mars.

Vinningurin er atgongumerki til allar konsertinar, ið verða á festivalinum og fløgurnar, ið hesi orkestur hava útgivið. Vónandi verður undirtøkan stór. Meiri fæst at vita við at senda eitt teldupost til Olavur Olsen á Olavur@hotmail.com ella hjá Tutl@info.fo

UTTAN ÚR HEIMI

Fann tekin um vatn á Mars

Amerikanska Marsfarið "Oppurtunity" hevur funnið tekin um, at vatn einaferð hevur verið á gongustjørnuni. Tað merkir, at lív kann hava verið har einaferð í tíðini

RÚMDIN
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

– Hesar myndirnar eru heilt ótrúligar. Tær vísa, at lendið kann hava staðið undir í vatni leingi, og at hetta annaðhvørt hevur verið eitt grunt hav ella eitt vatn.

Á rúmdarstøðini NASA og kring allan heim eru jarðfrøðingar óvfarnir av myndum, sum "Oppurtunity" hevur sent niður á Jørðina. Kanningar hjá farinum hava víst, at tað hevur funnið sulfatir og onnur evni, sum eftir øllum at døma eru vorðin til í vatni. Tað merkir eisini, at fyritreytirnar fyri lívi á Mars hava verið rættiliga góðar, sjálvt um kanningarnar ikki hava givið nakað beinleiðis tekin um, at lív hevur verið á gongustjørnuni.

"Oppurtunity" lendi á Mars tann 25. januar. Tríggjar vikur frammanundan lendi "Spirit" eisini har, og bæði førini hava síðani kannað viðurskiftini á reyðu gongustjørnuni. Hvørki "Oppurtunity" ella "Spirit" hava útgerð, sum beinleiðis kann ávísa, um lív hevur verið á Mars ella ikki, men ætlanin er at fáa nærri greiði á hesum í 2009, tí tá skulu kanningarfør við tílíkari útgerð sendast til Mars.

Uran horvið úr Svøríki

Amerikanska fregnartænastan CIA ber ótta fyri, at yvirgangsmenn kunnu hava fingið fatur á urani, sum er horvið úr einari goymslu í Svøríki

KJARNORKA
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Tað vóru svenskir myndugleikar, sum longu í fjør fingu illgruna um, at uran var horvið úr einari goymslu hjá fyritøkuni Ranstad Mineral, og í oktober vóru nakrir embætismenn hjá CIA í Stockholm, har teir vórðu kunnaðir um illgrunan, skrivar svenska blaðið Expressen.

Ein embætismaður hjá CIA sigur við blaðið, at Ranstad Mineral hevur lært nakrar sýrialendskar kjarnorkugranskarar, hvussu uran skal handfarast, og at svenska fyritøkan hevur selt Sýrialandi ymsa kjarnorkuútgerð. Talan var millum annað um útgerð til at viðgera geislavirkin evni, sigur embætismaðurin.

– Hevur fyritøkan selt sýrialendingum geislavirkin evni ella aðra útgerð til kjarnorkuendamál, er hetta eitt sera álvarssamt mál, sigur CIA-embætismaðurin við Expressen.

Blaðið veit at siga, at svensku myndugleikarnir rannsakaðu hølini hjá Ranstad Mineral, stutt eftir at CIA-umboðini høvdu verið í Stockholm, og at fyritøkan bleiv stongd orsakað av vantandi trygdartiltøkum. Deildarleiðarin í svenska trygdarverkinum, Carl Magnus Larsson, váttar hesi tíðindini fyri Expressen. Hann sigur, at trygdarviðurskiftini á Ranstad Mineral vóru út av lagi vánalig.

Avbjóðarin funnin

Við at vinna uppstillingarvalið í níuggju av tíggju statum gjáranáttina beindi John Kerry allan iva av vegnum. Tað er hann, sum skal bjóða Bush, forseta av í heyst

UPPSTILLING
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Í einari sjónvarpssamrøðu fyri fjúrtan døgum síðani umrøddi George W. Bush, forseti, John Kerry sum "ein senator í Massachusetts". Tað ger hann ikki longur. Gjáranáttina ringdi Bush til Kerry og ynskti honum tillukku við uppstillingini.

Avgerðin um, hvør skal stilla upp fyri demokratarnar og royna at fella Bush, kom gjáranáttina, tá John Kerry vann uppstillingarvalið í níggju av teimum tíggju statunum, sum høvdu uppstillingarval. Hann vann í Minnesota, Ohio, Massachusetts, Rhode Island, Connecticut, Maryland, Georgia og í teimum báðum fólkaríkastu statunum í USA, Kalifornia og New York. Howard Dean, sum tók seg burtur úr valstríðnum herfyri, vann kortini í sínum egna heimstati, Vermount. Tann einasti avbjóðarin, sum John Kerry hevði eftir, John Edwards, mátti lúta í øllum statunum.

John Kerry fór alt fyri eitt undir sjálvt valstríðið.

– Í meiri enn 30 ár havi eg verið frammarlaga á stríðsvøllinum, segði tann 60 ára gamli fyrrverandi Vietnam-hermaðurin og helt fram:.

– Eg havi altíð stríðst fyri rættvísi og teimum amerikonsku lívsvirðunum. Vit skulu leggja grundarlag fyri búskaparligari framgongd við at taka av skattalættan, sum Bush gav teimum ríku. Vit skulu skerja hallið á fíggjarlógini niður í helvt tey næstu fýra árini, vit skulu gera íløgur í heilsuverkið, hækka minstulønina og tetta allar smogur, sum tey tær stóru fyritøkurnar brúka fyri at flyta pengar og arbeiðspláss av landinum.

Hann lovaði eisini, at USA skal klára seg við egnari orku, og at hann fer at skapa 500.000 nýggj arbeiðspláss í orkuvinnuni.

Um uttanríkispolitikkin segði John Kerry, at USA skal inn aftur í altjóða samfelagið. Tær gomlu samgongurnar skulu endurnýggjast, samstundis sum nýggjar skulu skipast, tí tað er avgerandi fyri bardagan ímóti yvirgangi, segði hann og gav stjórnini hjá Bush eit spark fyri hennara uttanríkispolitikk:

– George W. Bush hevur rikið tann mest ódugnaligu, vandafulla og hástróra uttanríkispolitikkin í nýggjari amerikanskari søgu, segði Kerry.

Edwards varaforseti

Hann hevur nú vunnið uppstillingarvalini í 28 av teimum 31 statunum, sum hava havt uppstillingarval.

Hansara næsta stig verður at finna sær eitt varaforsetaevni, men sambært CNN fer hann helst at bíða við at boða frá, hvør tað verður. Hinvegin skal hann taka avgerðina, áðrenn demokratarnir fara at halda landsfund í summar

Tað er ikki óhugsandi, at tað verður kappingarneytin John Edwards. Veljarakanningar hava víst, at teir báðir fara at vinna forsetavalið ímóti Bush og Dick Cheney.

John Kerry og konan, Teresa Heinz Kerry, fegnast um sigurin gjáranáttina